# 1700 metrar til gamla dreymin



*Gunvør Ehlers hevur tikið eitt óvanligt stig at vilja búseta seg í Gásadali. Hetta er ein idyllisk bygd við slíkum vøkrum útsýni, ið er trupult at finna aðrastaðni*
Mynd: Jens Kr. Vang

**Gunvør Ehlers úr Sørvági hevur leingi havt ætlanir um at búseta seg í grannabygdini Gásadali. Umsíðir er líkt til at hetta gerst veruleiki. Spurningurin er bert um tað verður fyri jól, ella um Gunvør og børn hennara mugu inn í komandi árið, áðrenn tey skifta adressu!**

BYGDARLÍV
Snorri Brend
snorri@sosialurin.fo

**Gásadalur:** Tað er ikki á hvørjum degi, at nýtt sethús verður bygt her í bygdini.

Eftir at tunnil varð gjørdur til bygdina, er kortini líkt til at áhugi er fyri at búseta seg her í vestastu bygd okkara við vegasambandi.

Fyri nøkrum árum síðani fluttu eini eldri hjún úr

> *Hetta er veruliga eitt stað, har ein kann slappa av og kopla fullkomuliga úr*

Havn vestur higar at búgva. Og um stutta tíð fara fólk at kunna fylgja við, tá enn ein familja fer undir at byggja sethús í Gásadali.

Økið er avsett og pelarnir vísa, hvar hetta grundøki er, higar Gunvør Ehlers og børn hennara ætla sær at seta búgv.

- Eg havi altíð havt ein dreym um at búseta meg her í Gásadali. Nú verður hann umsíðir veruleiki, sigur hon í samrøðu við Sosialin.

Hósdagin hittu vit hana á grundøki hennara. Í næstum verður farið undir at grava út fyri nýggjastu sethúsunum í bygdini.

- Eg gleði meg at kunna flyta higar, sigur Gunvør, sum sjálv er ættað úr Sørvági.

## Týdningarmikið bræv

Fyri at finna orsøkina til at Gunvør yvirhøvur byrjaði at hugsa um at búseta seg í Gásadal, mugu vit leita eini 25 ár aftur í tíðina.

Um hetta mundið byrjaði hon at vitja regluliga í einum húsum í bygdini. Her

> *Summi hildu meg vera púra øra í høvdinum, meðan onnur søgdu: - Hví ikki tað?! Eg haldi bara, at ein má hava upplivað lívið her í dalinum, fyri at kunna úttala seg um tað*

var talan um eini vøkur hús í sunnari síðu.

- Síðani tá eri eg komin sera nógv niðan her – serliga um summarið, men eisini hin partin av árinum, sigur Gunvør.

So líðandi byrjaði ein dreymur – og eitt ynski – at koma fram, um at búseta seg í Gásadali: - Hevði eg bara havt eini sethús heruppi!

Tað vóru tó nógvar fortreytir sum skuldu fáast uppá pláss, áðrenn hetta kundi gerast veruleiki, millum annað at grundøki vóru til taks. Men eingi grundøki vóru tøk hjá Sørvágs kommunu beint tá, av teirri einfaldu orsøk, at einki var gjørt við nakra útstykking í Gásadali.

Í juni mánaði í fjør varð enn ein umsókn send kom-